gult14 cyan14 magenta14 svart14



FISKIVINNUTÍÐINDI

## Gólvsølan 17. apríl

**Sjey bátar seldu knøpp tvey tons um gólvsøluna hjá Fismamarknaðinum, tá hon týsdagin eftir páskir aftur var aktiv**

| Skipanavn | reiðskapur | kilo |
|---|---|---|
| Sjóberin | lína | 124 |
| Reynir | snella | 654 |
| Hjallur | snella | 81 |
| Klettur | lína | 81 |
| Heidi | snella | 44 |
| Zelotes | snella | 612 |
| Borgin | snella | 225 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 0 | 10 |
| Brosma 3&4 | 2 |
| Hýsa 1 | 12 |
| Hýsa 2 | 12 |
| Hýsa 3 | 35 |
| Hýsa 4 | 20 |
| Kalvi 5 | 1 |
| Skrubba | 1 |
| Toskarogn | 1 |
| Toskur 2 | 72 |
| Toskur 3 | 620 |
| Toskur 4 | 854 |
| Toskur 5 | 178 |
| Upsi 0 | 3 |

# Fiskiskapurin í fremmandum sjogvi ovurtstóran týdning

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri*

Meðan heimaflotin fiskaði fyri eina góða milliard í fjør syrgdu skip sum fiska uttanfyri føroyskt havøki fyri at fiska fyri knappliga 700 milliónum krónum.

Her er talan um nótaflotan, trolararnar í Barentshavinum, rækjuflotan og ídnaðarbátarnar.

– Fiskiskapurin uttanfyri føroyusku landleiðirnar er ein týdningarmikil partur av inntøkuni hjá samfelagnum og gevur viðbrekna føroyska búskapinum fleiri bein at standa á. Tí fer eitt aðalmál í fiskivinnupolitikkinum framhaldandi at vera at halda fast um, og bøta um, fiskiveiðisamstarvið við onnur lond á ein hátt, sum tænir føroyskum áhugamálum. Hetta snýr seg bæði um at hava sínámillum fiskiveiðisáttmálar við onnur lond á høgum støði, og at Føroyar hava ein virknan lut í teimum felagsskapum, sum viðgera teir fiskastovnar, ið hava ella kunna koma at hava týdning fyri okkum, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri í samband við at landsstýrið hevur givið út eina frágreiðing um fiskivinnupolitikkin hjá samgonguni.

– Ein stórur partur av inntøkugrundarlagnum hjá fiskiflotanum hevur verið og er framvegis fiskiskapur á leiðum, sum liggja uttanfyri føroyskt øki. Tí hevur tað alstóran týdning, at vit leggja okkum eftir at fáa so góðar sáttmálar við onnur lond í framtíðini sum møguligt, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

## Greenpeace hóttir nú flakatrolararnar

Greenpeace krevur nú, at norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, rekur flakatrolararnar burtur av grunnunum kring Lofoten, soleiðis at stórur gýtingarbúgvin toskum sleppur at gýta.

Fær Greenpeace sín vilja, so kemur hetta eisini at ganga útyvir føroysku flakatrolararnar, som plaga at royna á Røstbankanum við Lofoten undan gýtingini.

Roknað verður við, at 85 prosent av toskinum sum kom at gýta í ár við Lofoten var so smáur, at talan var um tosk, sum gýtti fyrstu ferð.

## Hvalur og kópur eta nógv

Toskurin er ikki tann einasti í Barentshavinum, sum etir nógvan fisk. Grønlandskópurin og sildrekin eta eisini nóg. Fiskifrøðingar rokna við at kópurin í Barentshavinum etir 3,4 milliónir tons av fiski, erliga av polartoski, lodnu sild og toski. Sildrekin etir 1,2 milliónir tons av fiski, serliga sild, lodnu, toski í hýsu í Barentshavinum. Roknað verður eisini við at sjófuglur etir umleiðs 1,4 milliónir tons, mest af fiski.

## Japan veitt 440 sildrekar

Mikudagin í seinastu viku kom eitt japanskt skip aftur við 2000 tonsum av úrdráttum úr 400 sildrekum, sum teir hava veitt seinastu fýra mánaðarnar í Suðurpólhavinum, skrivar Aftenposten.

– Hetta er tað mesta vit hava loyvi at veiða í Suðurpólhavinum, men veiðan hevur eisini givið okkum týdningarmiklar upplýsningar um stovnin, sum kunnu nýtast til gransking, segði Minoru Morimoto, japanski limurin í altjóða hvalaveiðunevndini IWC.

Greenpeace sigur hinvegin at talan er als ikki um gransking, men handilsliga veiðu.

## Kili kann gerast heimsins alirisi

Fiskimálaráðharrin í Kili, Daniel Albarran roknar við at alivinnan í Kili um eini 20 ár kemur upp á 180 milliardir krónur. Í fjør útfluttu kilenar fyri góðar níggju milliardir av alifiski. Samamberast kann Noreg, sum útflutti í fjør fyri 13,3 milliardir krónur og Noreg er størsta alaraland í heiminum.

Albarran heldur, at um tíggju ár er útflutningurin komin upp á 27 milliardir krónur. Tí verður nú ein nýggj loyvislóg viðgjørt í tinginum. Kili hevur ógvuliga langa strond við góðum vakstrarlíkindum hjá alifiski og í framtíðini verður eisini farið undir at ala annan fisk enn kyrrahavslaks.

## Kjarnorkukøstur fyri norðan

Tingið í Russlandi, Dumain, skuldi í gjár taka støðu til eitt lógaruppskot, sum kann gera landið til dumpingarpláss fyri kjarnorkuburturkasti frá øllum Europa, skrivar Intrafish. Russland ætlar at vinna pening burturúr kjarnorkuburturkastinum og hetta skal goymast og flytast við skipið til norðurstrond Russlands.

## Mælir føroyingum til hvalaveiðu

Íslendski hvalaveiðumaðurin Kristjan Loftsson, sum viðtjaði Grindamannafelagið í Føroyum herfyri, mælti føroyingum til at fara undir at veiða storhval aftur.

– Hóttanin frá umhvørvisfelagsskapum, um vit verða boykottaðir handilsliga er uttan hald. Norðmenn selja eins nógvan fiskaúrdrátt í Europa um teir skjóta hval. Føroyingar drepa grind og hetta gongur ikki útyvir fiskaútflutningin, so hvat er at óttast, segði Kristian Loftsson við útvarðið herfyri.

Kristjan Loftsson helt, at tað vildi styrkt hvalaveiðuna í Norðuratlantshavi um føroyingar og íslendingar saman fóru undir hvalaveiðu.

Íslendingar hava enn ikki givið íslendskum hvalabátum loyvi at fara at skjóta hvat.

## Nú skal aldur laksur merkjast

Heims nátturuverndarstovnurin WWF krevur, at allur norskur aldur laksur sum gongur í ringunum skal merkjast innan januar 2003. Stovnurin krevur eisini, at alarar fáa stórar bøtur, um laksur sleppur úr nótunum og at alarar missa loyvi, um fiskur sleppur úr ringunum fleiri ferðir.

Hvørt ár sleppa umleið 500.000 laksar úr norsku aliringunum. Alilaksur verður roknaður at vera størsta hóttanin móti villa laksinum, ið er hóttur.

WWF heldur at størsta orsøkin til at so nógvur laksur sleppur er kleyvarskapur.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

